## DAGSINS MEINING

# Skúlin fyri øll

Skúlin er meira enn nakrantíð áður á dagsskrá. Pisakanningin hevur sett ljóskastaran á fólkaskúlan og sama er um visjónsarbeiðið at siga. MBF hevur havt aðalfund, og nýtir felagið høvið til at venda sær til allar avvarandi myndugleikar um at taka fyrilit fyri børnum við breki. Tað verður nógv tosað um skúlan fyri øll. Í yvirlýsing frá MBF verður talað um at gera skúlan til ein skúla fyri øll og ikki bara um eins skúla fyri øll. Her er sum vera man munur á.

MBF ger vart við, at skal skúlin vera fyri øll, so eru fleiri viðurskifti, ið mugu rættast. Her er talan um heilt grundleggjandi fortreytir og ikki serstakliga fløkt teoretisk ella yvirskipað viðurskifti. Sum dømi kunnu vit nevna, at skal skúlin vera fyri øll, er neyðugt, at øll sleppa inn í skúlan og frítt kunnu flyta seg runt í skúlanum, eisini tey í koyristóli. Neyðturvilig tímajáttan má eisni vera tøk, soleiðis at einstaki næmingurin fær tað tilboð honum ella henni tørvar. Her er enn langt á mál halda vit okkum skilja.

Tað er eisini neyðugt við kunning til skúlan, tá næmingur við breki kemur í skúla, so at skúlin fær høvi at fyrireika seg. Her hevur samstarvið millum skúla og heim stóran týdning. Hetta mál snýr seg eisini um eftirútbúgving av lærarum og er tørvurin stórur i hesum høpi. Ein tann størsti spurningurin er tó læraraútbúgvingin. MBF vísir á, at skal skúlin vera fyri øll, so mugu teir komandi lærararnir fáa dyggan kunnleika til ymisk brek og til serundirvísing. Tað er ikki minni átroðkandi, at lærarar í starvi fáa holla eftirútbúgving. MBF hevur júst valt Leilu Solmunde aftur til forkvinnu. Leila var av blaðnum tilnevnd ársins kvinna fyri síni avrik sum formaður í MBF. Vit ynskja henni tillukku við afturvalinum og ynskja felagnum góða eydnu í stríðnum fyri skúlanum fyri øll.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# MBF havt aðalfund

Týsdagin 30. mai hevði MBF sín árliga aðalfund. Formaðurin Leila Solmunde stóð fyri vali og varð hon afturvald. Í starvsnevndini sita nú, umframt formannin, Lea Wolles, formaður í Landsfelagnum fyri fólk við autismu, Jógvan Sofus Vágsheyg, nevndarlimur í Heilafelagnum, Hendrik Jacobsen, formaður í Sclerosefelagnum og Kristianna Rein, formaður í Diabetesfelagnum, nývald.

Á aðalfundinum varð hjálagda yvirlýsing samtykt.

## Yvirlýsing frá MBF

***"Skúlin fyri øll"*** verður ofta havdur á munni. Men hvussu er veruleikin?

Um skúlin veruliga skal vera fyri ***øll*** – eisini tey við breki – eru fleiri viðurskifti, ið mugu betrast.

Hesi viðurskifti kunnu í hvussu er býtast í 4 øki:

**Fysiskir karmar**

Skal skúlin vera fyri ***øll***, er neyðugt, at ***øll*** sleppa inn í skúlan og fáa ferðast um í skúlanum, eisini tey í koyristóli. Harafturat krevst, at høli eru tøk til nemingatillagaða undirvísing. Hølisumstøðurnar eru sum heild kommunal ábyrgd!

***Starvsfólkaorka***

Skal skúlin vera fyri ***øll***, er neyðugt, at hóskandi tímajáttan er tøk, soleiðis at einstaki næmingurin fær tað tilboð, honum tørvar. Hetta kann fevna um serundirvísing, eyka undirvísing, stuðulstímar, røkt v.m. Tað er umráðandi, at rúm verður fyri ymiskum fakbólkum at røkja hesar uppgávur, tí eingin fakbólkur einsamallur hevur alla vitanina. Hinvegin kann ein fjølbroyttur starvsfólkahópur geva hvørjum øðrum íblástur.

***Tilrættislegging***

Skal skúlabyrjanin verða góð, er neyðugt, at skúlin í góðari tíð verður kunnaður um serliga tørvin hjá einstaka næminginum og í góðari tíð fyrireikar skúlabyrjanina og kunnar foreldrini um sínar ætlanir, soleiðis at alt er gjørt, sum gerast kann fyri at geva næminginum við breki eina góða skúlabyrjan. Henda fyrireiking umfatar sjálvsagt eisini skeið til viðkomandi lærarar.

Mong av børnunum við breki hava ikki møguleikan at fara út at spæla við onnur børn eftir skúlatíð. Tí er alneyðugt, at skúlin veitir eitt heildartilboð, soleiðis at tann stuðulsfólkaskipan, ið ansar børnunum seinnapart, verður tætt knýtt at skúlanum og kann samstarva við skúlan – møguliga í somu hølum – so báðir partar seta sær felags mál fyri tað einstaka barnið.

**Læraraútbúgving**

Skal skúlin vera fyri ***øll***, er neyðugt, at læraraútbúgvingin verður dagførd soleiðis, at lærarar eisini fáa kunnleika til ymisk brek og serundirvísing, teknmál og serligar læruhættir, ið kunnu nýtast til eitt nú menningartarnað. Eitt nú átti serundirvísing at verið eitt linjufak á læraraskúlanum. Alneyðugt er eisini, at lærarar fáa boðið hóskandi eftirútbúgving eftir tørvi.

Hesar hugsanir eru í samsvari við ***"Fyrimyndarreglur um at útvega javnlíkar møguleikar fyri fólk, ið bera brek"***, sum Sameindu Tjóðir lýstu í 1994, og sum Føroya Landsstýrið hevur givið út á føroyskum fyri fyrstu ferð í 1999 og aftur í 2004. Í 6. reglu verður ásett, at skúlatilboð til fólk við breki eigur at vera innlimaður / integreraður partur av skúlaskipanini í vanliga skúlanum í nærumhvørvinum.

Vit eiga eisini at hava í huga, at um børn við breki eru ein náttúrligur partur av vanliga skúlanum, venja uppvaksandi ættarlið seg til, at fólk við breki eru ein náttúrligur og sjálvsagdur partur av samfelagnum.

Tí verður heitt á bæði landsmyndugleikar, kommunur og skúlaleiðslur um veruliga at gera skúlan til ***ein*** skúla fyri ***øll*** – og ikki bara ***eins*** skúla fyri øll.

Yvirlýsingin varð samtykt á aðalfundinum hjá MBF, 30 mai 2006

# Stutt aftursvar til Boga

**BEATE L. SAMUELSEN**
Býráðslimur í Havn



Eg eri púra samd við tær í, at einki nýtt er í tí at stuðla einum tónleikatiltaki, og at privatar fyritøkur gera tað – bæði peningastovnar, Dimmalætting, Atlantic Airways, you name it.

Munurin er bara hann, at Tórshavnar býráð stuðlar ikki teimum festivalum, ið tú nevnir í aftursvarinum. Teimum sponsoratunum standa privatar fyritøkur fyri.

Og tað er júst har, hundurin liggur grivin.

Mál, sum býráð, bygdaráð, løgtingið ella almennir stovnar stuðla fíggjarliga ella hava ynski um at stuðla fíggjarliga, skulu endavendast í politiskt samansettum nevndum. Slíkari pappírsmyllu sleppa privatir sponsorar undan.

Um so var, at vit stuðlaðu festivalum sum býráð, ivist eg ikki eina løtu í, at tað hevði verið upplýst í málinum, sum nevndarlimirnir høvdu fingið upplýst undir viðgerð av eini møguligari umsókn.

Tær upplýsingar vantaðu í tónleikatiltakinum Asfalt bæði í februar og aftur í mai, men tað kanst tú ikki gera við.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.